# NÚ SKULU ØLL ÚT AT GANGA

**ÚTIVIKA** Annað árið á rað verður skipað fyri sonevndu útivikuni, sum hevur til endamáls at fáa fólk at seta bilin og heldur ganga ella súkkla til arbeiðis



*Á tíðindafundinum í morgun vóru frá vinstru: Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður, Pál Weihe, frá Fólkaheilsuráðnum, Heidi Abrahamsen frá Sjóvar Kommunu, Eydna Lindenskov frá Psykiatriska deplinum, Marjun Poulsen frá eldraøkinum, Inna Sigvardsen, starvsfólkaleiðari á Føroya Tele og Ann Mari Anthoniussen, leiðari á Dagstovninum í Hoyvík.*

Mynd: Álvur Haraldsen

Leo Poulsen

Í fjør var á fyrsta sinni roynt at skipa fyri sonevndu útivikuni. Og hesar royndirnar hepnaðust so væl, at stig eru tikin til ein eina slíka viku í ár.

Fólkaheilsuráðið og Heilsumálaráðið saman við Aksel V. Johannesen skipa fyri hesi vikuni, har tað í ár verður sett fokus á rørslu.

Útivikan í fjør var sera væl hepnað, fólk tóku væl ímóti. Almenn og privat starvsfólk saman við privatum, og eisini ítróttafeløgini tóku væl ímóti vikuni, sigur Aksel V. Johannesen.

Landsstýrismaðurin vísti á tað sunna í rørslu og eisini tað fyribyrgjandi í at røra seg.

– Útivikan hevur eisini tað positiva við sær, at hon kostar einki. Øll kunnu vera við uttan at tað kostar eitt oyra. Tað sparir eisini bæði í bensini og umhvørvi at lata bilin standa, sigur Aksel V. Johannesen.

## Vónandi fara fólk at halda fram við at ganga, eisini efti at útivikan er av í ár, sigur Aksel V. Johannesen.

Hann vónar tí, at fólk fara at taka væl ímóti útivikuni í ár.

– Vónandi fara fólk at halda fram við at ganga, eisini efti at útivikan er av í ár, sigur Aksel V. Johannesen.

Á tíðindafundinum í morgun í Heilsumálaráðnum vóru eisini Pál Weihe frá Fólkaheilsuráðnum við, Heidi Abrahamsen umboðaði Sjóar kommunu, sum hevur fleiri tiltøk á skráni í komandi viku. Eydna Lindenskov frá Psykiartiska deplinum greiddi frá, hvat stendur á skránni hjá teimum í útivikuni, og Marjun Poulsen greiddi eitt sindur frá, hvat tey í eldraøkinum ætla sær at gera í útivikuni. Tey ætla eitt nú at halda olympiskar leikir við kyndlagongu og tjóðsangi, og síðani verða ymsar kappingar.

Inna Sigvardsen, virkandi starvsfólkaleiðari á Føroya Tele, greiddi frá heilsupolitikkinum í FT, og at tey skipa fyri tiltøkum gjøgnum alt árið. Og at enda greiddi Ann Mari Anthoniussen, leiðari á Dagstovninum í Hoyvík frá, hvussu tey ætla at skipa útivikuna.

Útivikan byrjar annan Hvítisunnudag, 24. mai, og heldur fram til 30. mai.